


# Enn eitt vónbrot hjá Statoil í Arktis

Deil:

**Jan Müller**

22.07.2014 - 15:12

Oljan.fo

Pallurin Transocean Spitsbergen er liðugur at bora tann næsta leitibrunnin fyri Statoil á Hopen-leiðini nærhendis Bjarnoynni. Oljustýrið sigur í einari fráboðan, at Statoil kom fram á gass, men at talan er ikki um eina rakstrarverda nøgd.

Fyrr í summar boraði Statoil ein leitibrunn á Apollo-leiðini, men har var hvørki olja ella gass at finna.

Úrslitið av boringini á Hopen-leiðini er eitt vónbrot fyri Statoil, men fyri Greenpeace og aðrar umhvørvisverndarfelagsskapir er talan um eini gleðiboð. Í summar fóru fólk hjá Greenpeace upp á pallin, og har vóru tey í tvey samdøgur, til løgreglan fór eftir teimum.

Bjarnoyggin og havið rundan um oynna er lýst sum náttúruøki, og í Greenpeace bera tey ótta fyri, at ein oljuleki kann reka inn til oynna og dálka umhvørvið har, um illa vil til. Greenpeace kærdi eisini avgerðina hjá myndugleikunum at loyva Statoil at bora so nær Bjarnoynni, men kæran vann ikki frama.

Statoil hevur ein møguleika eftir at finna olju ella gass í umráðnum í ár. Talan er um Mercury-brunnin, sum er sunnan fyri hinar báðar. Transocean Spitsbergen skal eisini bora hann.